409 nýggir skattgjaldarar í Føroyum

Toll- og Skattstova Føroya hevur higartil stovnað yvir fýrahundrað til útlendskar oljuarbeiðarar. Hesir eru allir útlendingar, sum starvast hjá útlendskum fyritøkum

SKATTUR
Heri á Rógvi

Oljuvinnan hevur so við og við fingið fastatøkur í føroyska samfelagnum. Tvey umfør við royndarboringum eru í løtuni ígongd, og enn fleiri skulu byrjað longri frammí í tíðini.

Tað, at oljufeløgini er komin at virka í Føroyum merkist eisini. Eitt stað, har tey vita einamest um, hvussu oljuvinnan ávirkar føroyska búskapin er hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Í 1999 sá ein kolvetnisskattalóg dagsins ljós. Henda varð seinni broytt í mars 2000, og ásetur hon, hvussu landið skal lønast við skattum frá feløgum og arbeiðsfólki. Eisini varð í mars 2000 gjørd kollvetnisskattafyrisitingarlóg, ásetur álíkning, innkrevjing, eftirlit o.a. í sambandi við skatting av kollvetnisvirksemi.Tað er hetta lógarvirksemi, sum oljufyritøkurnar mugu rætta seg eftir.

Toll- og Skattstova Føroya hevur eina serliga deild at taka sær av hesum málum. Á hesari deildini, ið kallast Kollvetnisskattadeildin, starvast trý fólk, er tað teirra uppgáva at syrgja fyri, at skattakrónurnar frá oljufólkunum koma undir land hjá landskassanum. Leiðarin á kollvetnisskattadeildini eitur Asbjørn Olsen.

30 nýggj virki, 409 nýggj arbeiðsfólk

Seinastu tveir mánaðinar hava fólkini uppi í Albert Hall havt úr at gjørt. Eini 30 nýggj virki eru, sambært Asbirni Olsen, stovnaði. Talið á nýggjum p-tølum er 409. Hesi fólkini skulu øll gjalda 35 % av teirra inntøku til føroyska landskassan. Hesi 409 p-tølini eru øll givin til útlendskar arbeiðarar hjá útlendskum fyritøkum, sum eru við í føroysku oljuvinnuni. Hetta tal ljóðar av nógvum, og tá hugsað verður um nógva pengarnar, sum gera seg galdandi í oljuvinnuni, er skjótt at ímynda sær stórt ríkidømi. Hvussu nógv hesi góðu fólk geva landskassanum at tyggja uppá er ikki greitt enn. Sambært Asbjørn Olsen, so verður tað um mánaðarskifti, at tey fyrstu tølini vera klár, sum vísa, hvussu nógv hesi fólkini hava givið landskassanum.

Hesi 409 fólk mugu mestir fyrst og fremst vera umborð á Sovereign Explorer og West Navion. Umborð á West Navion er pláss fyri 117 fólkum, og Sovereign Explorer hevur um 90 fólk umborð. Leggja vit hesi bæði tølini saman og falda við tvey, tá hugsað verður um, at fólk skiftast um at vera umborð, so verður hetta tal meira enn 409. Ikki øll umborð ganga eftir somu skattareglum, tá nøkur eru føroyingar. Eisini er ikki altíð soleiðis, at tað er fullmannað umborð.

Í øllum førum situr bróðurparturin av teimum fólkunum, sum hava fingið nýtt føroyskt p-tal umborð á entin Sovereign Explorer ella West Navion.

Eindømi

Kollvetnisskattalógin er, sambært Asbjørn Olsen, sum so at meta sum eitt avrit av teirri donsku lóggávuni. Fyrisetingarlóggávan er tó ikki lík nakrari aðrari í heiminum.

-Í Føroyum verður lønirnar hjá útlendsku arbeiðarunum skattaðar gjøgnum samtíðarskattaskipanina, og hetta er eitt eindømi, sigur Asbjørn Olsen.

Kolvetnisskattalógin umfatar bæði offshore arbeiðarar og arbeiðarar á landi. Hetta sama er ikki galdandi í eitt nú Norra. Vanligt er aðrastaðni, at tað er arbeiðsgevarin, sum sjálvur roknar út, men í Føroyum verður einstakur arbeiðari skrásettur.

Sosialurin skilir, at henda skipanin hevur við sær eyka umsitingarligt arbeiði hjá teimum ymsu fyritøkunum, men fyritøkurnar halda seg ikki aftur av hesi orsøk. Feløgini royna og skulu rætta eftir teimum lógum, sum eru galdandi fyri landið, har tey virka.

Mánadagin fara 699 børn í skúla fyri fyrstu ferð

Mánadagin verða 699 børn at síggja á til og frá skúla fyri fyrstu ferð, tá ræður um hjá bilførarum at vísa serlig ansni

Bilur yvirhálar við gonguteig, hetta er sera vandamikið

Børn á gonguteigi – sera vandamikið er, tá bilar yvirhála á gonguteigi

Ferðslytrygd heitir á bilførar um at vera serliga árvaknir, nú nógv børn verða at síggja í gøtunum

SKÚLAGONGD
Ferðslutrygd

Mánadagin 20. august fara 699 børn í skúla fyri fyrstu ferð. Vónrík við klárum eygum og spent fara tey avstað. Fyrsta dagin eru foreldrini við. Men longu næsta dagin vilja nógv sleppa sjálvi - einki við at verða fylgd av foreldrunum - »tað gjørdi man í barnagarðinum«. Og hetta er veruleikin, tí tá ið børn okkara fara í 1. flokk, verður væntað av teimum, at tey byrja at taka ábyrgdina av sær sjálvum í ferðsluni.

Næstu dagarnar fara vit so aftur at síggja børn í reyðum, gulum og grønum, hetta er tiltak, sum Ferðslutrygd hevur gjørt saman við MBM seinastu mongu árini. Saman við keppunum verður eisini faldari latin til foreldrini at lesa, so at tey verða betur útgjørt at tosa um trupulleikarnar í ferðsluni saman við børnum teirra.

Sum vant verður eisini upplýst um hetta í sjónvarpinum og í ár er nýggjur filmur gjørdur. Temaið í honum er bilur, sum yvirhálar bil, sum stendur við gonguteig.

Orsøkin til at júst hetta evnið er valt er hetta teldubrøv frá einum pápa:

»Til Ferðslutrygd

Eg koyri børn í skúla næstan hvønn morgun. Fyrsti steðgur er við nonnuskúlan, har plagi eg at steðga í høgru síðu koyrandi omaneftir Varðagøtu áleið við niðankoyringina til KFUK og seti børn av.

Seinastu tveir morgnarnar hevur tað passað seg soleiðis, at tá ið eg koyri víðari, eri eg eri komin til gonguteigin yvir um Varðagøtu við inngongdina til skúlan, tá ið okkara børn skulu ganga yvir um. Eg steðgi so har, meðan børn ganga yvir um gonguteigin. Bæði í gjáramorgunin og í morgum verði eg yvirhálaður í vinstru síðu, meðan eg haldi aftur fyri gangandi børnum. Serliga í morgun var vandi á ferð, tí viðkomandi, sum yvirhálar meg, sær jú ikki børnini, fyrr enn tey ganga beint framman fyri koyrandi bilin.«

Løgmaður letur seg ikki provokera

Løgmaður stúrir fyri møguleikanum, at almenna viðmerkingin hjá Karsten Hansen kann vera ein liður í tí »skipaða ágangi«, sum hann sjálvur ávaraði føroya fólk um fyri einari viku síðan. – Men eg ætli ikki at lata meg provokera, sigur Annfinn Kallsberg, løgmaður

POLITIKKUR
Rúnar Reistrup

Løgmaður er skelkaður av, at Karsten Hansen finst at honum í almennari viðmerking í fjølmiðlunum.

– Eg kenni ikki Karsten aftur í hesum, sigur løgmaður, sum ikki er samdur við fíggjarmálaráðharranum um, at hann skal hava brotið greiðar avtalur, soleiðis sum tað verður sagt í viðmerkingini.

– Hetta er alt sera undarligt fyri mær. Eg trúgvi ikki, at hetta er Kartsen soleiðis, sum eg kenni hann. Har eru nakrar ramsur í viðmerkingini, sum ikki líkjast hansara máta at úttrykkja seg uppá. Tað samskifti, sum vit hava havt, hevur altíð verið sera gott, sigur løgmaður.

Ósaamdir um avtalurnar

Í viðmerkingini, sum varð prentað í bløðunum í gjár, sigur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, seg harmast um úttlalilsini hjá løgmanni um at uppskotið um Búskapargrunn Føroya bara er »hálvliðugt«. Karsten Hansen sigur løgmann ganga beint ímóti greiðum avtalum í hesum máli.

Men Annfinn Kallsberg er av einari heilt aðrari uppfatan enn Karsten Hansen um hvørjar avtalur eru gjørdar í málinum um Búskapargrunn Føroya.

Karsten Hansen sigur í viðmerking síni, at semja var í samgonguni um at senda uppskotið um búskapargrunnin í tingið skjótast gjørligt, meðan arbeitt varð víðari við einari útgjaldsskipan til grunnin. Annfinn Kallsberg sigur hinvegin, at hann allatíðina hevur gjørt greitt, at Fólkaflokkurin ikki vil hava uppskotið um búskapargrunnin fyri tingið, fyrr enn útgjaldsskipanin var klár.

Stúrir fyri endamálinum

Annfinn Kallsberg, løgmaður, sigur seg vera keddan av, at Karsten Hansen er farin út í fjølmiðlarnar við viðmerking har hann leggur løgmann undir at bróta avtalur, og hann stúrir fyri møguleikanum, at talan kann vera um eina ætlaða provokatión.

– Viðmerkingin ber brá av, at her skal okkurt út at hanga úti í almenninginum. Hetta minnir meg um nakað tað sama, sum eg ávaraði ímóti fyri einari viku síðan, sigur løgmaður og sipar her til, at hann í farnu viku í almennari viðmerking ávaraði ímóti tí, sum hann kallaði »skipaðum ágangi« ímóti løgmansins samráðingarvilja.

– Eg havi ávarað føroya fólk um at tað fara at koma provokatiónir frá einum parti av sjálvstýrisvonginum, og tað harmar meg øgiligt, um hetta málið eisini verður brúkt í tí samanhanginum, sum eg havi ávarað ímóti. Men tað ræður um ikki at lata seg provokera av slíkum ágangi. Tað er so nógv man má lata sær lynda, um vit skulu hava nakran møguleika at røkka sjálvstýrisætlanini, sigur løgmaður.

Fer at tosa við Karsten

Løgmaður ætlar í næstum at taka almennu viðmerkingina upp við Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra. Hann heldur tað ikki vera annað enn natúrligt, at ósemjur eru í einari samgongu millum tveir so ymiskar flokkar sum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin, og at báðir partar tí mugu boyggja seg nú og tá.

– Tað er so nógv man má gera fyri sakina. Eg ætli mær ikki at lata meg provokera fyri harvið at forkoma teimum møguleikum vit hava at vinna so frægt á mál í sjálvstýrismálinum, sum samgongan hevur sett sær fyri. Og tað var júst tað, sum eg ávaraði ímóti í fyri einari viku síðan, nevniliga at tað vóru kreftir í hesum samfelagnum, sum nú fóru at leggja eftir løgmanni við tí endamáli at fáa hann provokeraðan. Men eg ætli ikki at lata meg provokera. Tað havi eg fingið ov harða húð til, sigur Annfinn Kallsberg, løgmaður.

Nógvar viðmerkingar um løgmann

Annfinn Kallsberg hevur verið høvuðsevni í nógvum almennum viðmerkingum hesi trý árini, hann hevur sitið sum løgmaður, og hann er sannførdur um at nógvar av teimum hava eitt samanhangandi endamál.

– Vit hava fingið dokumenterað prógv fyri, at tað er ein skipað strategi aftanfyri fleiri av viðmerkingunum. Eg skal ikki siga at landsstýrismenninir hjá Tjóðveldisflokkinum viðvirka í tí. Men tað er komið alment fram, at tað liggur ein greið strategi aftanfyri, hvat so endamálið er. Eg gjørdist varugur við tað longu í februar mánað, og nu prógvini blivu staðfest helt eg tað vera rætt at ávara fólk um hendan skipaða ágangin, sum hóttir við at forkoma sjálvstýrisarbeiðinum hjá samgonguni, sigur Annfinn Kallsberg, løgmaður.